# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# LAGALIGA LØTAN

Tað er áhugavert at fylgja við politiska arbeiðinum nú um dagarnar – serliga nú ein minnilutastjórn er veruleiki.

Tað var ikki gamalt, at ein landsstýrissamgonga, sum missir meirilutan, slapp at sita. Men tað er júst tað, sum nú er hent. Tjóðveldi hevur í makrelmálinum kastað saman við restunum av samgonguni, Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum, og úrslitið er ein semja um makrelin, sum røkkur longri enn til næsta val.

Men Høgni Hoydal hevur púra greitt sagt, at Tjóðveldi ikki er stuðulsflokkurin hjá landsstýrinum, og at hann heldur ikki eitt nú hevur góðkent – ella *ikki* góðkent, at Johan Dahl skuldi gerast landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

Tað er væl skiljandi, at tjóðveldisforðmaðurin sigur so. Flokkurin hevur jú bara gjørt eina semju um eitt mál, har hann er samdur við teir flokkar, sum eftir eru í samgonguni. Flokkurin hevur eisini gjørt upp við seg sjálvan, at meira er at vinna við at bíða eitt sindur við løgtingsvalinum.

Tosað hevur verður um »lagaligu løtuna«. Júst nú kunnu partar av politisku skipanini gera sær dælt av tí, eins og vit síggja við makrelsemjuni. Men tað eru eisini onnur mál, sum tykjast fáa meiriluta í tingum - eitt dømi er málið hjá Bjørt Samuelsen, Magna Laksáfoss og Kára á Rógvi um at bryggja brennivín og sterkt øl í Føroyum. Hetta er eitt mál, sum helst hevði komið undir »etisku málini« – sum slík mál verða kallað, har samgongan fær trupulleikar við einstøkum politikarum, sum vilja seta samgonguna í veð.

Men nú er eingin samgonga at seta í veð, og tí tykist tað at bera til at fáa hetta málið samtykt.

Freistin at leggja mál fyri tingið hesa tingsetuna er farin. Men verður samgonguni lív lagað í vetur, so verður spennandi at síggja, hvussu tingarbeiðið fer at hátta sær. Tað kann hugsast, at fleiri kontroversiell mál verða reist á tingi, nú arbeiðslagið eftir øllum at døma er broytt.



Nýggja veljarakanningin hjá Dimmalætting vísir, at flokkarnir sum stuðla samgonguni – ella sum ikki vilja fella samgonguna – hava gagn av at bíða eitt sindur við valinum. Tjóðveldi hevur somu styrki, sum flokkurin hevur havt síðani 1998, tó at flokkurin kann tilskriva sær eina pena framgongd, og Framsókn fær so mikið stóra undirtøku, at flokkurin kemur á ting við somu styrki, sum Sjálvstýrisflokkurin, sum missir nógv. Stóri taparin er Fólkaflokkurin, meðan Javnaðarflokkurin, sum hevur mist mest í øllum kanningum, sær út til at vaksa aftur, og tí er tað kærkomið hjá Aksel V. Johannesen, at bíðað verður við valinum.

**Tað passar fleiri væl at bíðað verður við valinum**

# Pengar lupu av hjá Kringvarpinum

Fyri fyrstu ferð síðan Útvarpið og Sjónvarpið í 2005 vórðu løgd saman til Kringvarp Føroya, hevur stovnurin havt avlop.

Roknskapurin vísir, at í fjør var avlopið 30.000 krónur. Annars hevur talan verið um hall hvørt ár. Í 2006 var hallið 135.000 krónur, men so versnaði tey bæði næstu árini, tí í 2007 var hallið 1.290 milliónir og í 2008 var hallið heilar 3.268 milliónir.

Men so fór at ganga frægari, tí í 2009, var avlopið minkað niður í 599.000 krónur og í fjør bleiv so talan um eitt avlop, sigur Kringvarpið.




Stýrið fyri Kringvarpið sigur, at stóra avbjóðingin er støðugt at tillaga virksemið eftir skiftandi inntøkum.

Kringvarpsgjaldið er nøkulunda støðugt, men inntøkurnar frá spølum og lýsingum, sum eru ein triðingur av inntøkunum, eru rættuliga skiftandi.

Hesi fimm árini eru lýsingainntøkurnar hjá Kringvarpinum lækkaðar 38%, frá 13 milliónum í 2006, niður í góðar 8 milliónir í 2010.

# 11 prosent meira komu inn í kringvarpsgjaldi

Við lógarheimild kundi Kringvarpið í fjør krevja 4,7 milliónir meira inn í kringvarpsgjaldi, og tí kláraði stovnurin at fáa eitt mikroskopiskt yvirskot í roknskapinum.

Tað er trupult at reka kommersiellar miðlar í Føroyum. Men tað er ein himmalvíður munur á at reka privatar miðlar, sum bara verða riknir út frá handilsligum fortreytum, og kappast við Kringvarpið um lýsingarmarknaðin. Kringvarpið, sum hevur slakar 47 milliónir krónur í almennum stuðuli pluss eitt ókeypis sendinet frá løgtinginum, er størsta hóttanin móti privatu miðlunum í Føroyum.

Vit kunnu so bara staðfesta, at meðan løgtingið ongar trupulleikar hevði av at útvega Kringvarpinum 4,7 milliónir í eyka inntøku, so er trupult at gera nakað við kappingaravlagingina hjá Kringvarpinum, sum er vælsignað av landsstýri og løgtingi.

Soleiðis er politiskt atgerðarloysi størsta hóttanin móti privatum miðlum í Føroyum. Vit bíða í spenningi eftir niðurstøðuni hjá Fjølmiðlakommissiónini, hóast sera ótolin...



**Ikke meget at grine af**

KINNA POULSEN
KJAK Á SÍÐU 14



**Tá tað besta forðar tí góða**

SJÚRÐUR SKAALE
KJAK Á SÍÐU 13



# Symfoniorksetur hevur barnakonsertir

Eini 4.000 børn í aldrinum 3 - 10 ár úr øllum landinum koma til tær 12 barnakonsertirnar sum Føroya Symfoniorkestur hevur í Norðurlandahúsinum hesa vikuna.

Høvuðsverkið hesuferð er nýtt tónleikaverk sum symfoniorkestrið hevur umbiðið.

Kári Bæk hevur skrivað tónleikin, Rakul Helmsdal skrivað søguna og Janus á Húsagarði hevur gjørt tekningarnar.

Annfinnur Heinesen er frásøgumaður og fortelur søguna, meðan orkestrið spælir tóneikin og myndirnar síggjast á stórskíggja.

# Frits í Runavík

Hósdagin letur Frits Johannesen úr Fuglafirði upp framsýning í gallarí Elisabeth við Heiðavegin í Runavík. Framsýningin, sum er opin frá klokkan 16 til 18, leygardagin frá 13 til 18, og sunnudagin frá klokkan 14 til 18.

Framsýningin er opin til og við sunnudagin.



**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*